

Norski olju- og orkumálaráðharrin Tord Lien. Mynd: OED/Scanpix

# Sær onga kreppu - hóast 21000 arbeiðspláss eru horvin í oljuídnaðinum

**Jógvan Hugo Gardar**

18.06.2015 - 07:20

Oljan.fo

Norski olju- og orkumálaráðharrin Tord Lien úr Framsóknarflokkinum sær onga kreppu í oljuvinnuni. Hetta sigur hann samstundis sum eitt nýtt yvirlit vísir at 21.438 arbeiðspláss í norsku oljuvinnuni eru horvin hetta farna árið.

Tord Lien sigur at tað er neyðugt við broytingum í oljuvinnuni, og at fleiri størv fara at hvørva.

Í samrøðu við Dagens Næringsliv sigur hann at neyðugt er at meir má koma burturúr hvørjum einstøkum sum arbeiðir í oljuvinnuni.

- Talan er um eina kreppu fyri tey sum verða rakt, fyri vanlig fólk, men fyri vinnuna er ikki talan um nakra kreppu, sigur Tord Lien sambært Dagens Næringsliv.

Ståle Kyllingstad, í oljufyritøkuni IKM Group, heldur at tað er skelkandi at ein ráðharri tosar um at talan ikki er um eina kreppu fyri vinnuna. IKM Group hevur sagt 150 fólkum úr starvi farna árið.

- Tað er irriterar meg at hoyra tey sum tosa um at talan ikki er um eina kreppu. Kreppan kom í mai 2014, og um tey ikki hava fanga tað, so er tað skelkandi. Øll sum meina at talan ikki er um eina kreppu, tey arbeiða antin í einum stórum altjóða felag sum alltíð hava pengar, ella so eru tey politikkarar ella onnur sum hava eina aðra dagsskrá, sigur Kyllingstad sambært Dagens Næringsliv.

Tord Lien vísir á at oljuvinnan hevur havt undanvind síðani seinastu kreppu í vinnuni frá 1998 til 2001. Tí kallar hann tað sum hendir nú ein neyðug tillaging fyri at forða fyri eini enn truplari tíð fyri oljuvinnuna seinni.